Fara nú at krevja pengarnar aftur

Kommunur, sum ikki játtaðu at pengar úr Kommunala Veðhaldsgrunninum varð brúktur til at sanera tær ringast staddu kommunurnar fyri, hava á fundi samtykt at krevja peningin aftur. Nú er nevnd sett at arbeiða viðari við málinum

KOMMUNUSANERING
Áki Bertholdsen

–Vit fara nú at krevja peningin aftur, sum Kommunali Veðhaldsgrunnurin ognartók frá okkum, sigur Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður í Sjóvar Kommunu. Níggju kommunur hava havt fund um málið, men nú verða fleiri aðrar kunnaðar um støðuna.

Tær kommunurnar, sum ikki játtaðu, at Kommunali Veðhaldsgrunnurin kundi brúka pening at sanera tær ringast staddu kommunurnar fyri, fara nú at krevja peningin aftur.

Beinanvegin tað varð greitt, at pengar vórðu brúktir úr Kommunala Veðhaldsgrunninum, til at sanera kommunuskuld hjá nøkrum kommunum fyri, vóru tað summar kommunur, sum gjørdu vart við, at tær fóru at krevja sín part av pengunum aftur. Um neyðugt fóru tær at leggja sak ímóti grunninum.

Tá ið peningurin skuldi gjaldast úr grunninum til at sanera nakrar kommunur, skuldu allar kommunur senda grunninum eina váttan uppá, at tær góðtóku, at pengarnir blivu brúktir til endamálið.

Men tað vóru fleiri kommunur, sum ikki sendu váttanina inn aftur. Vit hava fingið upplýst, at tað vóru heilar 35 kommunur, sum ikki játtaðu grunninum at brúka pengar til at sanera kommjnuskuld við.

– Sostatt hava tær ikki givið tilsøgn um, at pengarnir í Kommunala Veðhaldsgrunninum kunnu brúkast til at sanera skuld hjá summum kommunum við, sigur Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður á Strondum.

Hann var ein av teimum, sum beinanvegin gjørdi greitt, at tað varð ikki góðtikið, at pengar hjá Sjóvar Kommunu blivu brúktir til at sanera skuld hjá øðrum komunum við.

Hann gjørdi samstundis greitt, at teir fóru at krevja at fáa tað aftur, sum Sjóvar Kommuna átti í grunninum.

Síðani hevur tað verið roynt at fáa allar kommunurnar, sum ikki vildu góðtaka saneringina, at gera eitt felags krav krav ímóti grunninum.

Fyribils vórðu kommunur, sum ikki vildu góðtaka saneringina, kallaðar saman til fundar í Havn seinasta hósdag at viðgerða støðuna.

Eivind Jacobsen sigur, at umboð fyri níggju kommunur møttu upp. Men nú fáa hinar kommunurnar, sum ikki játtaðu grunninum at brúka pengar til saneringina, eina frágreiðing um tað, sum fór fram á fundinum.

Eivind Jacobsen sigur, at fundurin valdi eina trímannanevnd at arbeiða víðar i við málinum.

Umframt hann sjálvan, eru Annfinn Brekkstein av Velbastað og Sofus Johannesen við Gjógv, í nevndini.

Ólógligt

Eivind Jacobsen sigur, at avtalan er nú, at hendan trímannanevndin skal nú tosa við landsstýrið og stýrið fyri Kommunala Veðhaldsgrunnin um støðuna .

– Samstundis fara vit at krevja peningin aftur.

Hann sigur, at førir hetta ikki til eina loysn á málinum, ivast hann ikki í, at farið verður víðari við málinum, og at málið verður lagt fyri rættin. Hetta var tó ikki umrøtt so nógv á fundinum. Men í øllum førum er hann púravísur í, at Sjóvar Kommuna fer at royna málið í rættinum. Aðrar kommunur, eitt nú Hósvíkar Kommuna, hava eisini boðað frá, at tær fara at taka neyðug stig fyri at fáa pengarnar aftur.

Eivind Jacobsen sigur, at talan er um einar 30-35 milliónir, sum tær kommunurnar eiga í grunninum, sum ikki vildu játta, at pengar blivu brúktir til sanering.

– Á fundinum hósdagin fingu vit eisini eina lógfrøðiligafrágreiðing. Og niðurstøðan hjá honum var tann sama, sum hinar løgfrøðiligar niðurstøður, ið eru gjørdar í hesum máli.Og tað er at tað var ognartøka, tá ið Kommunali Veðhaldsgrunnurin brúkti pengar hjá summum kommunum at sanera skuld hjá øðrum kommunum við, uttan at tær kommunur, sum áttu peningin, høvdu givið tilsøgn til tað.

Eivind Jacobsen leggur afturat, at á fundinum seinasta hósdag, vóru tað fleiri kommunur, sum greiddu frá, at tær høvdu spurt seg fyri lógfrøðingi, men at allir komu til sama úrslit.

Karsten Hansen gevur skarvin yvir

– Tað er tíðarspilla at gera fleiri royndir at fáa semju um lønina hjá manningina á nýggja vaktarskipinum, Brimli, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður

LØNARÓSEMJA
Áki Bertholdsen

Karsten Hansen fer ikki at kalla manningarfeløgini aftur til fund at samráðast um lønina hjá yvirmonnunum við Brimli. Nú er Fíggjarmálalastýrið farið at savna tilfar saman til at leggja ósemjuna um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við Brimli, fyri Løgtingið

Karsten Hansen, landsstýrismaður, hevur nú givið skarvin yvir í royndunum at finna eina samráðingarloysn á ósemjuni um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu sigla við nýggja vaktar- og bjargingarskipinum, Brimli.

Landsstýrismaðurin sigur, at nú má hann ásanna, at tað kemst ikki víðari við samráðingum. Tískil hevur hann gjørt av, at hann kallar ikki partarnar saman aftur til fundar.

– Tað er tíðparspilla, bæði hjá okkum og hjá teimum, og tað er bara at draga málið enn longur út, sigur hann.

Eftir hansara tykki kom ongantíð gongd á samráðingarnar.

– Vit hava nú samráðst í meiri enn tríggjar mánaðir, men yvirmannafeløgini hava ikki viljað slaka ein tumma, sigur Karsten Hansen. Tí hevur tað als ikki verið talan um samráðingar, sigur hann.

Yvirmannafeløgini siga hinvgin, at tey hava sett síni krøv fram og tey ætla feløgini ikki at víkja frá. Tey siga, at krøvini, sum tey hava sett fram eru rímilig.

Fort hevur verið fram, at talan er um krøv um lønarhækking uppá yvir 40%, men tað halda feløgini er ikki órímiligt at krevja í einum.

– Lønin, hjá teimum, sum sigla við Vaktar- og Bjargingartænastuni, er láturlig. Yvirmenninir umborð hava tað sama í løn, áðrenn skatturin er tikin, sum starvsfelagar teirra uttanlands, í størvum, sum kunnu samanberast við hetta, hava eftir í løn, eftir at skatturin er tikin, hava yvirmannafeløgini fort fram.

Ósemjan í Løgtingið

Av tí sama er Fíggjarmálastýrið nú farið at fyrireika eitt uppskot at leggja fyri tingið um, hvussu lønin hjá yvirmonnunum á Brimli skal vera.

– Sum málið sær út í løtuni, endar tað nokk við, at málið verður lagt fyri tingið, sigur Karsten Hansen.

Feløgini vilja ikki samráðast og tey vilja ikki hava semingsmenn uppí. So tað eru ongir møguleikar at semjast, sigur hann.

Hann vil kortini onki siga um, hvussu uppskotið verður orðað.

– Vit fara at savna alt tilfarið saman og so seta vit eitt uppskot saman. Áðrenn tað verður lagt fyri tingið, skal landsstýrið sjálvsagt góðkenna tað.

Hann hevur hoyrt, at Útvarpið hevur havt upplýst, hvussu nógv Fíggjarmálastýrið hevðu boðið yvirmonnunum í løn.

– Tað var heilt burturvið og teir upplýsingarnir koma ikki frá mær.

Útvarpið hevur eisini upplýst, at Fíggjarmálastýrið kanska fór at skjóta upp, at ein óheft nevnd skuldi setast at áseta lønarlagið hjá teimum, sum sigla við vatkartænastuni.

– Eg sigi onki um uppskotið, fyrrenn tað er gjørt, sigur Karsten Hansen.

Hann vil heldur ikki siga, um uppskotið bara kemur at fevna um yvirmenninrar, ella um at kemur at fevna um alla manningina á Brimli, tvs, eisini teir, sum eru limir í Starvsmannafelagnum.

Men hann vísir á, at Starvsmannafelagið hevur ikki lagt arbeiðið niður. Men, sum sagt, tað er ikki greitt, hvussu uppskotið verður orðað.

Hann leggur tó afturat, at kemur tað so langt verður tað fyrsta dagin, at uppskotið verður lagt fram.

Ólóglig gengransking í Føroyum

Týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, er meldað til fútan fyri at hava tikið blóðroyndir frá føroyingum til gengransking. Orsøkin til meldingina er, at tey neyðugu loyvini frá vísindasiðseminevndini ikki hava verið í lagi. Løgreglan arbeiðir í løtuni við málinum

GENGRANSKING
Stefan í Skorini

Tað var her á ambulatoriinum, at blóðroyndirnar vórðu tiknar. Blóðroyndirnar skuldu nýtast til gengransking í Hollandi, og málið er nú latið fútanum, sum arbeiðir við málinum

Mynd: Jens Kr. Vang

Fyri jól fekk Fútaskrivstovan eina fráboðan um, at ólógligar blóðroyndir vórðu tiknar á Landssjúkrahúsinum í Havn. Royndirnar skuldu nýtast til arvagransking, men siðseminevndin hevði ikki givið loyvi til hesa granskingina.

Dorthe Møller Andersen, politiassessor á Fútaskrivstovuni, váttar tíðindini fyri Sosialinum. Fyri jól fingu tey eina melding, sum snýr seg um, at ein lækni er farin undir at taka blóðroyndir ætlað til biomedisinska gransking uttan loyvi frá siðseminevndini.

Av Fútaskrivstovuni verður sagt, at málið nú skal ganga sína gongd. Tey skulu meta um málið, og síðani skulu avhoyringar vera. Ongar avhoyringar hava tó verið enn.

Eisini verður váttað, at talan er um týska barnalæknan, Ulrike Steuerwald, sum er meldað.

Genini granskast í Hollandi

Ulrike Steuerwald hevur arbeitt í Føroyum í fleiri ár, men starvast nú í Hannover í Týsklandi. Hon var farin undir at kanna sjúkuna vøddasvinn, og granskingin skuldi fara fram á University Hospital í Nijmegen í Hollandi.

Hetta var gjørt í samstarvi við foreldur at børnum við sjúkuni. Familjulimir hjá sjúklingum vórðu spurdir, um teir høvdu hug at lata blóð til granskingina, og tað stóð fólki frítt at velja. Talan var um at fara so langt í familjutrænum sum til systkynabørnini. Tey, sum vildu vera við, skuldu møta upp á ambulatoriinum á Landssjúkrahúsinum, har royndirnar vórðu tiknar.

Blóðgevarnir fingu eina váttan, sum Ulrike Steuerwald og Gerry Steenbergen, sum starvast á University Hospital í Nijmegen, hava skrivað undir.

Í váttanini stendur: »Tá tann broytingin í arvastreinginum(mutatiónin), sum er orsøk til sjúkuna, er funnin (og hetta tekur út móti 1,5-2 árum), verður alt tilfar, sum ikki varð brúkt, givið aftur til heilsuverkið í Føroyum. Einans tann, sum hevur latið royndina, verji, ella avvarðandi tess, um so er, viðkomandi er deyður, má fáa kanningarúrslitini at vita frá limunum í granskarabólkinum.«

Harafturat verður sagt, at í møguligum ritum um granskingina fer ikki at bera til at finna fram til persónligar upplýsingar.

Um granskingin er steðgað er ikki greitt, men sum Sosialurin skilur, so er granskingin fyribils løgd á hillina.

Einki loyvi

Kravið hjá øllum, sum ætla sær at fara undir gengransking í Føroyum, er, at siðseminevndin hevur góðtikið granskingarætlanina.

Høgni Djurhuus, formaður í vísindasiðseminevndini, sigur, at nevndin ikki hevur fingið nakra umsókn til hesa granskingina hjá Ulrike Steuerwald, og tískil fyriliggur heldur eingin góðkenning frá nevndini.

– Tað, sum nevndin fyrst og fremst hevur í huganum, tá støða verður tikin til umsóknir, er, at granskingin kemur øllum samfelagnum til góðar. Endamálið er, at samfelagið fær ágóðan av granskingini, sigur Høgni.

– Annað av aðalmálum okkara er, at blóðgevarnir eru tryggir. Teir skulu hava ta neyðugu upplýsingina um granskingina áðrenn. Vit skulu tryggja, at blóðgevarnir eru vardir.

Høgni sigur seg ikki kenna nakað til annað føri, at granskarar soleiðis eru farnir undir gransking, uttan at ráðføra seg við siðseminevndina fyrst.

Kanningarnar hjá Ulrike fevndu um onnur fólk enn bara veruligar sjúklingar. Tá tað er tilfelli, hava vit strangar reglar fyri, hvussu farast skal fram. Loyvi krevst.

Spæla okkum av við møguleikan

Líkt er til, at vit í Føroyum eru við at spæla okkum av við ein gyltan møguleika. Ístaðin fyri at landsstýrið setir á stovn ein føroyskan bio-banka, har allar blóðroyndir frá føroyingum verða goymdar og kannaðar í Føroyum, so verða føroysk gen flutt av landinum til gransking.

Vit hava sera strangar reglur í sambandi við gengransking í Føroyum, og tí er tað hinvegin eisini ógvuliga løgið, at ein útlendskur lækni kann seta seg at taka blóðroyndir til gengransking á ambulatoriinum á Landssjúkrahúsinum uttan stórvegis hóvasták.

Fimmogtjúgu posthús eiga at niðurleggjast

Stóð tað til stjóran á Postverki Føroya vórðu millum 20 og 25 posthús latin aftur umgangandi. Nógvu posthúsini í landinum skulu eitast at tryggja smáplássunum eina góða tænastu, men sambært postverkstjóranum er hetta í veruleikanum ein bjarnatænasta, sum ger tænastuna verri.

POSTUR
Rúnar Reistrup

Tað er stutt millum posthúsini í Føroyum. Alt ov stutt, heldur stjórin á Postverki Føroya, Bergur í Garði, ið gjarna vildi sloppið at snara lyklinum um á meginpartinum av posthúsunum í landinum.

Veruligi tørvurin á posthúsum er sambært stjóranum ikki meira enn millum tólv og fimtan deildir.

Í dag eru eini 40 posthús í landinum, og postverkstjórin tosar soleiðis um at lata eini 25 posthús aftur.

Orsøkin til, at hetta ikki longu er gjørt, er at ásett er við lóg hvar í landinum posthúsini skulu liggja. Tískil skal ein umlegging av Postverkinum til, áðrenn posthúsini á smáplássunum kunnu niðurleggjast

Og tað hendir ikki tey komandi árini, nú sitandi landsstýrið hevur gjørt semju um ikki at broyta bygnaðin á Postverki Føroya komandi trý árini.

Hetta nívir postverkstjóran.

– Talið á posthúsum forðar okkum beinleiðis í at veita ta tænastu, sum viðskiftafólk okkara ynskja. Posthúsini eru dýr at reka, og tá tað ikki ber til at lata tey aftur, hava vit ístaðin verið noydd at skorið so nógv í upplatingartíðunum, at summa staðni er bara postavgreiðsla í ein tíma um dagin. Og tað er ikki ein nøktandi tænasta at bjóða viðskiftafólkunum, sigur Bergur í Garði.

Handlar veita posttænastu

Heldur enn at hava posthús í hvørjum króki í landinum, sær postverkstjórin fyri sær eina loysn, har Postverkið ger avtalur við størri handlar úti um landið um postavgreiðsluna á staðnum.

– Tað letur seg væl gera at avgreiða post aðrastaðni enn á einum posthúsi. Tað verður gjørt í øllum londunum kring okkum við góðum úrsliti. Høvdu vit sloppið at latið posthúsini aftur og ístaðin gjørt avtalur við handlar á somu støðum, hevði tað famvegis borið viðskiftafólkunum til at avgreitt so at siga øll postviðurskifti á staðnum. Munurin hevði verið tann, at postavgreiðslur kundu verið gjørdar tað mesta av degnum heldur enn bert teir fáu tímarnar, ið posthúsið á staðum er opið.

Postverkstjórin heldur soleiðis, at politikararnir gera fólki eina bjarnatænastu við at lógaráseta hvar posthús skulu vera. Ætlanin við hesum var upprunaliga at tryggja smærri plássunum eina góða posttænastu, men veruligu avleiðingarnar eru sambært postverkstjóranum beint øvugtar, samstundis sum tað kostar Postverkinum óneyðuga nógv í rakstrarútreiðslum.

– Sjálvsagt hevði tað eisini kostað at gjørt avtalur við handlar um postavgreiðsluna, men sum nú er reka vit eina rúgvu av posthúsum, sum standa tóm og afturlatin tað mesta av degnum, og tað sigur seg nærum sjálvt, at hetta er ein óneyðuga dýr loysn við so nógvum posthúsum, sigur Bergur í Garði, stjóri á Postverki Føroya.

Skeivur høvuðstuðul

Í grein í Sosialinum mikudagin, har greitt varð frá, hvussu lýsarar hava fingið ein nýggjan ókeypis og ómakaleysan hátt at koma í samband við fólk við at senda SMS boð til allar føroyskar fartelefonir, hevði ein lítil misskiljing stungið seg upp.

Sagt varð, at Føroya Tele var høvuðsstuðul hjá tiltakinum, ið lýst varð fyri. Tiltakið talan var um, er konsertin við DJ Alligator á Kambsdali leygarkvøldið í komandi viku.

Hetta er ikki so. Føroya Tele og konsertfyriskiparin hava bert samstarvað um lýsingar á internetinum.

Stuðlarnir hjá tiltakinum eru sambært internetlýsingini fyri tiltakið: KontoIN, Atlantic Airways, Føroya Bjór, Statoil, Krydd og altso ikki Føroya Tele.